## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 6 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av vestri. Yvirhøvur turt, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Saðlar og súlur

**Pálmessudagur er farin afturum, og fyrstu búfuglarnir eru eftir gamlari frásøgn afturkomnir. Ymsar frásagnir eru um dagin, ið fór**

PÁLSMESSA
*Edvard Joensen*



*Drangarnir vestan fyri Mykineshólm*

*Mynd: Edvard Joensen*

Pálsmessa er farin, og súlan og lomvigin eru komin. Men ivasamt mundi vera, hvussu nógvir hestar vórðu saðlaðir í sólskini á pálsmessu í ár.

Umskriva vit so orðini hjá Ísaki Dirðli til Jákup á Møn eitt lítið sindur og siga, at illa verður av í ár eftir gomlum merki, so fer ikki at standa væl til við veðrinum í summar.

Men nú kunnu vit so í fyrsta umfari gleðast um, at nú byrjar fuglurin at koma aftur. Í fyrsta lagi súla og lomvigi. Og so fer at ganga skjótt við tí. Tað er í hvussu er hugaligt.

Hestarnar hava vit hjá okkum alt árið, og so kunnu vit bara velja ein annan sólskinsdag at saðla teir. Helst móti vári. Hvítar ella ikki.

Men hví so pessimistisk, at vit bara leggja merki til tað, sum vantar? Liggja sum Paulus á Damskusvegnum á sinni. Starblind og síggja ikki tað bjarta ljósið, ið er á veg upp aftur á himmalin.

Og vit fagna fuglinum, sum aftur kemur av heitari og ljósari leiðum. Nú aftur fer at vára. Kreppan er av, og liviligari verður væntandi aftur í landinum. Hesir, sum fóru, tá útlitini vóru sum ringast.

Øðrvísi eru havhesturin og krákan, sum eingin kvøður nakran prís, hóast tey verða verandi, tá mest stendur á, og hutla seg gjøgnum ófantaliga føroyska veturin ár eftir ár.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -6 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 4 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | -8 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -5 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 8 |
| Athen | 15 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 13 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | -- |
| New York | -5 |
| Miami | 10 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1046 hPa. vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og mennist. Eitt brúgvalag yvir Íslandi verður nær Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Hátrýstið vestan fyri Írland stendur framvegis í stað og norðan fyri hátrýstið rekur lýggj luft móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/1 kl. $06^{00}$–25/1. $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 24/1 kl. $06^{00}$–25/1 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í januar: 176,6 mm

Sosialurin 1 Fyrst við tí seinasta

## VESTFALLSKYRRINDI

23. januar — Mánin longst frá jørðini
25. januar — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. Jan | 07.26 | 19.46 | 06.26 | 18.46 | 06.41 | 19.01 | 09.26 | 21.46 | 10.26 | 22.46 | 05.41 | 18.01 | 04.41 | 17.01 | 07.41 | 20.01 | 08.41 | 21.01 | 07.11 | 19.31 | 08.26 | 20.46 |
| 27. Jan | 08.06 | 20.24 | 07.06 | 19.24 | 07.21 | 19.39 | 10.06 | 22.24 | 11.06 | 23.24 | 06.21 | 18.39 | 05.21 | 17.39 | 08.21 | 20.39 | 09.21 | 21.39 | 07.51 | 20.09 | 09.06 | 21.24 |
| 28. Jan | 08.42 | 21.00 | 07.42 | 20.00 | 07.57 | 20.15 | 10.42 | 23.00 | 11.42 | - | 06.57 | 19.15 | 05.57 | 18.15 | 08.57 | 21.15 | 09.57 | 22.15 | 08.27 | 20.45 | 09.42 | 22.00 |
| 29. Jan | 09.19 | 21.37 | 08.19 | 20.37 | 08.34 | 20.52 | 11.19 | 23.37 | 00.00 | 12.19 | 07.34 | 19.52 | 06.34 | 18.52 | 09.34 | 21.52 | 10.34 | 22.52 | 09.04 | 21.22 | 10.19 | 22.37 |
| 30. Jan | 09.55 | 22.14 | 08.55 | 21.14 | 09.10 | 21.29 | 11.55 | - | 00.37 | 12.55 | 08.10 | 20.29 | 07.10 | 19.29 | 10.10 | 22.29 | 11.10 | 23.29 | 09.40 | 21.59 | 10.55 | 23.14 |

5 707265 100036 >